# Í RSF leingjast teir eftir suðuroyingum



**Eftir at 70 ára gamli Suðuroyingurin vann old boys róðurin á Ólavsøku kyknaði tosið um luttøku úr Suðuroy í kappingini millum 10–mannafør av nýggjum**

SUÐUROYINGAR OG 10–MANNAFØRINI
*Jóannes Hansen*

Tað var ikki sørt av nostalagi uppi í, tá ið tað ólavsøkuaftan varð skipað fyri kapping millum 10-mannafør við old boys manning. Sum vit søgdu fyri Ólavsøku, so vóru í ár 70 ár síðani Suðuroyingurin fyrstu ferð tók lut í ólavsøkuróðrinum. Hetta vildu teir á Tvøroyri vera við til at markera, og teir høvdu fleiri í fylgi við sær úr Suðuroy og á Ólavsøku. Sumbingur og Vágbingur luttóku eisini í kappingini saman við Havnarbátinum, Kjøli og gamla Nólsoyinginum.

Við borgarstjóranum á Tvøroyri, Kristini Michelsen, á odda vann Suðuroyingurin. Hann var meiri enn tvær bátslongdir undan Sumbinginum, sum vann tætta kapping við Vágbingin um næstfremsta lássið.

Hannis Joensen, formaður, í Róðrarsambandinum, hevur fleiri ferðir fyrr í summar sagt seg vóna, at suðuroyingar fara at koma afturíaftur í kappingini millum 10–mannaførini, har teir áður vóru stinnir og drúgvir.

Víst hevur verið á, at menninir umborð á Smyrli tvey tey seinastu árini so staðiliga hava prógvað, at tað ber til at manna kappróðrarbát í Suðuroy og at vera við í kappingini millum teir fremstu.

Fyri heilt fáum árum síðani fingu teir í Vági nýggjan Vágbing, og teir á Tvøroyri fingu nýggjan Tvørábát, sum teir nevndu nýggja 10–mannafarið. Báðir bátarnir royndu seg í eitt ár ella tvey, men tað hilnaðist ikki nakað serligt, og nú hevur einki verið at sæð til teir í fleiri ár.

Tá ið Smyril ólavsøkuaftan hevði vunnið FM heitið, var bátsformaðurin, Jóhan Sofus Müller, ikki so vísur í, um teir, sum tvey tey seinastu árini hava vunnið FM við Smyrli, næsta ár fara at vera við til at manna 10–mannafarið.

– Tað fáa vit at síggja í januar. Tað hevur fleiri ferðir verið tosað um møguleikan, men einki er avgjørt, og tað valdast, hvussu tað verður statt við fólki og við huginum at leggja so nógv fyri, tá ið tað skal farast undir fyrstu fyrireikingarnar til róðrarárið. Tær vera eftir nýggjár, segði bátsformaðurin umborð á Smyrli.

Síðani tað fyri tredivu árum síðani varð farið undir ta slagið av FM kapping, sum síðani hevur verið galdandi, hevur bara ein bátur úr Suðuroy vunnið FM í kappingini millum 10–mannafør. Vágbingurin var meistari í 1980.

Undir gomlu skipanini, har FM varð avgjørt í einum róðri aftaná Ólavsøku, vunnu suðuroyingar eisini eina ferð. Skipanin var galdandi frá 1964 og til og við 1972. Sumbingur vann róðurin í 1964.

# Kaunas spælari doyði

**Toppskjúttin í fjør doyði, tá ið hann sunnudagin í BMW bili rendi inn í ein garð**

EUROPA CUP MÓTSTØÐULIÐ
*Jóannes Hansen*

Í gjárkvøldið var Kaunas mótstøðulið hjá Glasgow Celtic. Tað var Celtic, sum HB og allir fótbóltshugaðir føroyingar droymdu um í hesi vikuni skuldi verða mótstøðulið hjá HB. Men HB tapti, sum kunnugt, báðar uppgerðirnar ímóti Kaunas úr Litava, og harvið varð einki av Celtic vitjanini í Føroyum á hesum sinni.

Sunnudagin varð litaviski fótbóltsheimurin og serliga tey í Kaunas rættuliga skelkað av stórum sorgarleiki. Álopsspælarin hjá Kaunas, Andrius Slekys, sum síðsta kappingarár var toppskjútti í litavisku kappingini, koyrdi í BMW bili sínum inn í ein garð, og hann doyði av samanbrestinum.

So vítt, sum tað hevur borið til at staðfest, so var Andrius Slekys ikki við í dystunum ímóti HB í Føroyum fyri tveimum vikum síðani og í Litava fyri einari viku síðani.

# Føroyskir HM rógvarar ásigldir í Danmark

**Sigrid Svartá slapp við skursli og gulum og bláum merkjum, tá ið hon kom undir ein motor katamaran**

HM RÓGVARAR
*Jóannes Hansen*

Tað kundi havt vitað heilt illa við, men tíbetur spældi tað bara væl av. Sigrid Svartá og Katrin Olsen hava áður roynt seg í rógving í Føroyum, og tær vita alt um at fyrireika seg til og rógva á Ólavsøku. Í ár vóru tær ikki við í ólavsøkuróðrinum. Sum nevnt í síðstu viku, so fyrireika tær seg nú til HM kappingina í rógving, sum verður í Milano í Italia í næstan mánað. Og tað var í sambandi við fyrireikingarnar til HM, at tað kundi havt vitað heilt illa við.

Leygardagin í síðstu viku vandi dupulta fýra mannafarið ella dame dobble fireren á Bagsværd vatninum norðan fyri Keypmannahavn. Tað er henda bátin, sum Sigrid Svartá og Katrin Olsen eru við til at manna.

Undir venjingini rendi ein katamaranur á róðrarbátin. Hann fór upp um bátin, og Sigrid Svartá var undir, har báturin fór omanfyri. Hon slapp við dyggum slagi í ryggin, skursli og bláum og gulum merkjum, og tað var so at siga eitt undur, at ikki størri skaði stóðst av. Sigrid fekk ikki størri mein, enn at hon longu fleiri ferðir aftur hevur verið og vant til HM kappingina, men, sum sagt, so kundi tað havt vitað nógv verri við.

Tað var mannligi venjarin í felagnum, sum var róðursmaður á katamaraninum. Hann hevði gloymt alt um reglurnar fyri fjarstøðu og trygd annars í sambandi við rógving. Hetta var ikki fyrsta ferðin, at hann hevur verið orsøk til sovorðnan samanstoyt. Fyri tveimum árum síðani rendi hann á gull fýraran, sum mannfólkabáturin, ið hesi seinnu árini hevur staðið seg so væl, verður nevndur. Eisini ta ferðina slapp manningin við smávegis snuddum.



# Føroyameistarar



*Drekin*



*Sílið*



*Smyril*



*Gongurólvur*



*Ørvur*



*Eysturoyingur*